

Jan Müller, stjóri í FOÍB og ábyrgdarhavandi á føroyska oljuportalinum fer at fylgja arktiskari ráðstevnu á Christiansborg. Her er hann stæddur á føroyska básinum á oljumessu í Stavanger. Myndatøka: Jógvan E. W Poulsen.

# Oljuportalur fylgir arktiskari ráðstevnu á Fólkatingi

**Jógvan Hugo Gardar**

19.04.2015 - 13:55

Oljan.fo

Mánadagin kl. 13 lata dyrnar upp í Landstingsalinum í Fólkatinginum, tá arktiski arbeiðsbólkurin setir arktisku londini í Ríkisfelagsskapinum, Grønland og Føroyar, á skránna. Hvussu fara veðurlagsbroytingar í Arktis at ávirka eitt nú vinnumøguleikar í hesum stóra partinum av heiminum, og hvønn týdning kann eitt broytt og øðrvísi Arktis fáa fyri eitt nú Grønland og Føroyar, eitt nú hvat viðvíkur skipaferðslu og ferðavinnu.

Millum fyrilestararhaldararnar vera eisini fleiri føroyingar, eitt nú forkvinnan í Visit Faroe Island, Guðrið Højgaard, stjórin í Atlantis Supply Base, Eli Lassen, Heðin Mortensen, borgarstóri í Tórshavnar kommunu, Marita Rasmussen stjóri í Vinnuhúsinum og onnur.

Oljuportalurin www.oljan.fo fer eisini at vera tilsteðar til tiltakið, ið longu hevur vakt stóran ans í Danmark. Har er fullteknað, umleið 120 umboð fyri vinnuna, myndugleikar og sendistovur vera við. Tað er Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður og formaður í arktiska arbeiðsbólkinum, sum fer at stíla fyri tiltakinum.

Jan Müller fer at umboða oljuportalin og fer at hava greinar frá ráðstevnuni. Arktis og framtíðar vinnumøguleikar har er eitt av mongum kjarnuøkjum hjá FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólki, har Jan er stjóri. Hann var í síni tíð eisini við í arbeiðsbólki, sum landsstýrið setti at gera uppskot til eina føroyska arktiska strategi.